# Posta Stamps

Føroyar

Nr. 23

Februar 2015

ISSN 1603-0036



**Nýggjar frímerkjaútgávur:**

- Sólarmyrking
- Europa 2015: Gamlar leikur
- Merkið 75 ár
- Onnur ferð mín til Føroya

Posta

FAROE ISLANDS







FO 808




FO 809 Royndarprent

# Full sólarmyrking 20. mars 2015

Mánin melur um jørðina, og jørðin melur um sólina. Eitt umfar hjá mánanum um jørðina varir ein knappan mánað. 12-13 ferðir hvørt ár kemur tí fyri, at mánin stendur millum okkum og sólina. Tá er tendring, sólkoma. Mánin kann tá standa beint fyri sólini, og so er sólarmyrking. Vanliga fer mánin tó yvir sólini ella undir sólini, tí mánaringrásin er ikki í ekliptika, sum er ringrásin hjá jørðini um sólina.

Fyrsta tendring í 2015 er 20. januar, onnur er 18. februar, triðja 20. mars o.s.fr. Tólvta og seinasta tendringin í 2015 er 11. desember. Tað vil so til, at tendringin 20. mars er soleiðis, at mánin tá kemur at standa beint fyri sólini í einari skuggaál, sum fer strúkandi norður ígjøgnum Atlantshav beint vestan fyri Føroyar. Tí verður myrkingin 20. mars í 2015 full í Føroyum. Skuggaálin er bara fáar hundrað kilometrar breið, og í henni mást tú vera, skalt tú uppliva eina fulla sólarmyrking.






FO 808-809
Royndarprent

Uttan fyri skuggaálina sæst ein lutvís myrking um stóra vídd í einum fleiri túsund kilometra breiðum øki.

Øðrvísi er við mánamyrkingum. Tær eru í fullari sól, tá ið jørðin er millum mánan og sólina, t.e. um leið 14 dagar fyri ella 14 dagar eftir tendring. Mánamyrkingar síggjast um ógvuliga stóra vídd náttarmegin á jørðini, tí jarðarskuggin er um leið 4 ferðir so breiður sum mánatvørmálið.

Í Tórshavn byrjar myrkingin 20. mars í 2015 við, at mánarondin kemur fyri sólina um leið kl. 8:38:50. Kl. 9:40:52 fjalir mánin alla sólina. Fulla myrkingin stendur í 2 minuttir, og kl. 9:42:53 kemur sólin undan aftur. Klokkan 10:47:38 er mánin aftur leysur av sóleyganum, og myrkingin er av. Verður klárt í veðrinum, fara vit at síggja sólina standa í ein landsynning um leið 20 stig yvir havsbrúnni. Eystan fyri sólina fara vit at síggja gongustjørnurnar Venus og Mars og vestanfyri fara vit at síggja Merkur. Eisini fer at bera til at síggja lofthavið um sólina, korona, um klárt er í veðrinum. Myrkt, ella rættari skýmligt, verður tað so undir øllum umstøðum.

Seinasta fulla sólarmyrking í Føroyum var 30. juni í 1954, og tann næsta eftir myrkingina 20. mars í 2015 verður ikki fyrr enn í 2245, og hon verður bara full norðast í Føroyum.

Ein full sólarmyrking er møguliga nevnd í einari føroyskari søgn. Í søgnini Hargarbrøður eru nevndir fýra brøður, sum búðu í Hørg í Sumba. Teir hava livað um ár 1600. Í søgnini stendur hetta brotið: Men sum teir gingu og róku seyð, báðir partar, og vóru komnir heim á Fløur (rættin stóð á Hellurók), tá kom so snøggliga eitt myrkur niður yvir teir. Angist kom á teir, og teir lovaðu nú øðrvísi enn fyrr,




at læt Várharra teir sleppa við lívinum, skuldu teir vera betri menniskjur. Tá lýsti í myrkrið aftur; teir hálsfevndust og lovaðu, at einki stríð skuldi vera teirra millum aftur. Síðan sótu teir so væl um sátt, at teir býttu ikki í pottin; alt var í felagi.

Tað man vera lítið at ivast í, at brøðurnir hava sæð eina fulla sólarmyrking. Talan er trúliga um fullu myrkingina 30. mai í 1612 stutt fyri middag. Hevur verið klárt í veðrinum, hava brøðurnir sæð gongustjørnurnar Jupiter, Venus, Merkur, Mars og Saturn á luftini, og sólin hevur staðið í ein landsynning nærindis stjørnuni Aldebaran.

Tað er ógvuliga umráðandi at verja eyguni, tá ið sólarmyrking er. Hygg altíð at fyribrigdinum ígjøgnum góðkendar verndarbrillur. Star ikki at sólini við berum eygum og hygg aldri at sólini í kikara, tí tá kanst tú missa sjónina beinanvegin. Bara meðan myrkingin er full, er ráðiligt at eygleiða fyribrigdið við berum eygum.

Á frímerkjunum, sum verða givin út í sambandi við fullu sólarmyrkingina, hevur teknarin brúkt sítt listaliga frælsi at tekna sólina eystan fyri Nólsoynna. Oyggin liggur beint eystur úr føroyska høvuðsstaðnum. Eins og ein stór alduverja verjir hon býin fyri havalduni. Í veruleikanum fer sólin at standa syðri á luftini, tá ið myrkingin verður.

Pól Jespersen

**"ENDALOYSIÐ OG SMÆSTU EINDIRNAR ERU LANGT HANDAN OKKARA AVMARKAÐA SKIL. ENDALOYSIÐ VIÐ SÍNUM STÓRLEIKA, TÆR SEINNU VIÐ SÍNUM LÍTILLEIKA. HUGSA TÆR, HVAT TÆR STØÐDIRNAR ERU, TÁ IÐ TÆR VERÐA SETTAR SAMAN."**

*Galileo Galilei*




**DKK 248**

**JÓANNIS SØRENSEN** setir rammu um stórbæra dreym Galileo ígjøgnum linsuna. Hann akkersfestir dulsmál alheimsins í eyðmjúka vakurleikanum í føroyskum bygdum, fjøllum og strondum.
Sum tú blaðar í hesi undurføgru bók, verður tú sogin inn í heim Jóannisar. Mynd eftir mynd starir tú inn í alheimsins undurverk við tryggum fótafesti í føroyskari jørð.



# Sólarmyrking 2015

Av tí at hetta er eitt heilt serligt fyribrigdi hevur Posta valt at gera eitt sindur burturúr frímerkjaútgávuni við sólarmyrkingini.
Her eru nakrar av vørunum, sum vit geva út í samband við sólarmyrkingina umframt sjálv frímerkini og smáarkið.

**Postkort**
Fýra stór postkort harav tað eina er uppruna tekningin til frímerkini. Hetta postkortið fæst eisini sum maksimumkort. Myndirnar á hinum postkortunum hevur Jóannis Sørensen tikið. Hesar umframt ein hópur av øðrum myndum eru somuleiðis at síggja í vøkru bókini "Hválv", sum fæst til keyps frá okkum.

## Tvey maksimumkort
Postkort við frímerki og stempli á forsíðuni.









**Hefti**

Tvey sjálvklistrandi hefti á ávikavist 4 x 17 kr. og 4 x 19 kr.




**Fyrstadagsbjálvi við smáarki**

Smáarkið á bjálva við fyrstadags-stempli.




**Fyrstadagsbjálvi við setti**

Fyrstadagsbjálvar fáast eisini sum sett við tveimum bjálvum, har eitt frímerki er sett á hvønn bjálva og við fýra eins frímerkjum á hvørjum bjálva.




**Serbjálvar**

Vit miða eftir at brøv og postkort við sólarmyrkingarfrímerkjum á, send tann 20. mars og umleið eina viku aftaná fáa eitt serligt stempul við dagfestingini 20.03.2015. Til ber at bíleggja serbjálvar við hesum stempli við báðum virðum - 17 og 19 kr.




**Heilørk**

10 frímerki eru í hvørjum heilarki.












FO 810-811 Royndarprent

# Europa 2015: Gamlar leikur

Evnið fyri ársins Europa útgávu er gomul barnaspøl. Edward Fuglø hevur teknað trølltoppu og hornaklingru, sum børn vanliga spældu við í gomlum døgum. Fyri at lýsa hesa tíðina og barnaspølini tá, hava vit valt at endurprentað nøkur brot út bókini "Føroysk barnaspøl" eftir Marius Johannesen, sum varð givin út í 1979:

**Gomul føroysk barnaspøl**

Vit, sum vórðu borin í heim um aldamótið (ár 1900) ella eitt sindur seinni, hava lyndi til at undrast, táið hetta nógva prátið er um børnini og um ungdómin.

Tað verður kravt av tí almenna, at tað ger okkurt fyri børnini, tí tey hava ongastaðni at vera, og tað hendir, at fólk úr øðrum londum koma henda vegin at gera barnagarðar til okkara børn at spæla í, og tað almenna hevur úr at gera við at útvega ungdóminum pláss til, sum tað verður sagt, at sláa frítíðina í hel í.

Tað er hetta, sum fær okkum at undrast, tí táið vit líta aftur á okkara barnadagar og skulu skriva eitt sindur um tey spøl, sum vit tá høvdu fyri, so tykist tað, sum ikki fæst tølur á hvørki spølunum ella spæliplássunum. Men tað var ongin, sum hevði gjørt okkum spæliplássini uttan Várharra. Tey funnu vit í túninum, á bønum, í áunum, í fjøruni, uttan fyri garðarnar og alla staðni, har sum barnafótur fekk stigið og slapp at stíga.

**Trølltoppan**

Í bók síni "Gamlar gøtur II" (1967) skrivar Maria Skylv soleiðis um trølltoppuna:

"Fyri gott og væl fýrsinstjúgu árum síðani var tað sjáldsamt at síggja smágentu spæla við dukku. Ikki tí, mong og ein kundi eiga sær dukku, sum pápi ella beiggi hevði havt við sær úr útlandi. Ein sovorðin dukka var kortini ikki til smágentuna at spæla við, nei, nei. Lokið varð tikið av pappdósini, hon lá í, og var ein hill í stovuhorninum, so varð dósin sett upp eftir enda har, ella hon varð løgd niður í kistuna. Har lá hon so ár undan ári, og bara onkuntíð, tá ið mamman skuldi taka okkurt upp úr kistuni, kundi smágentan sleppa at síggja – ja, kanska halda á dukku síni eina løtu.



Ikki var kortini neyðugt at fara uttanlands fyri at fáa okkurt at spæla við, tí hvør mamma dugdi at evna eina trølltoppu til smábørn síni. Hvat trølltoppan hevur gagnað bæði børnum og mammum, dugir mangur og ein ikki at skilja í dag. Nú á døgum hava krambúðir so nógv, ið kann fáa barnaeygur og -hug at gleðast og rætta eftir, og hvør er hon ella hann, ið ikki fegin vil gleða síni smáu? Eitt annað er, at tað fullfíggjaða, tey fáa at spæla við, mest sum køvir teirra hugsjónir.

Bæði gentur og dreingir, so leingi teir gingu í kjóla og vóru ov lítlir til dreingjaspøl, spældu við trølltoppuna. Ballað saman av eini gamlari stúkuspjørr, ið var løgd dupult, og høvdið evnað til og rubbað væl um hálsin. Tann spjørrin, sum ætlað var til armar, varð rullað saman og løgd í buktina, og so varð bundið fast um miðjuna.

Um høvdið varð lagdur ein hvítur skeyti, áðrenn rubbað varð um hálsin, og hendingaferð kundi verða strikað eygnabrýr og eygur við einum ímaðum snældupinni. Til reyðar kjálkar og varrar var tilsetningspappír frálíkt. Eitt gamalt fyriklæð til kjóla, so var hon liðug, tí bein hevði hon ikki."

**Hornaklingra**

Meðan vit tosa um horn, so var tað eisini vanligt, at vit spældu við hornaklingrur. Tá var slóin tikin úr horninum, og so vórðu fleiri horn sett saman, so at vit fingu ein ring av fýra, fimm, seks ella fleiri hornum, og so fóru vit í eina brekku í bønum at stikla hornaklingrur, men har var ongin kapping uttan tann, at tað ráddi um at hava ta hornaklingruna, sum fór beinast og longstan vegin, áðrenn hon datt á liðina.

Men við hvørt mannaðu vit okkum eisini hvørjumegin rásina, sum hornaklingran skal fara, við gassum í hondunum, og so skuldu vit royna at sláa hana, meðan hon kom við ferð omaneftir, og royna at fáa hana at fara um koll. Men tá ið ein stór hornaklingra kom við ferð oman eina bratta brekku, var hon ikki dæl at strúka, og tú mátti ansa tær, at hon kom ikki á teg, tí so var skaðin vísur. Hetta var eisini meiri eitt spæl fyri teir stóru dreingirnar, og teir smærru hildu seg so burtur frá hesum vandamiklu hornaklingrunum og stikladu horn í staðin fyri. Var tað tá eitt væl dánað veðrahorn, so kundi tað fara líka langt sum nøkur hornaklingra, áðrenn tað legðist á liðina.

*(Marius Johannesen: "Føroysk barnaspøl", Bókaforlagið Grønalíð, 1979)*










FO 812-813 Royndarprent

# Merkið - tjóðflagg Føroya í 75 ár

*Sjá tú blánar sum loftið*
*og tú rodnar sum blóð,*
*men hitt hvíta er fossur, brot og vetrarins ljóð...*

Sjáldan man lýsingin av litunum í føroyska flagginum hava passað betur enn tann 25. mai 2014, tá føroyski fjallaklintrarin, Arne Vatnhamar, breiddi Merkið móti bláum himni á snjóklædda tindinum á Mount Everest - heilt uppi í ørandi 8.848 metra hædd.

Eftir drúgvar og áralangar fyrireikingar, fekk 41 ára gamli føroyingurin dreymin uppfyltan – at seta føroyska flaggið á heimsins hægsta fjall.

Tað mundi kostað honum dýrt. Meðan hann klintraði seinasta teinin, í umleið 8.600 metra hædd, varð Arni brádliga raktur av hæddarsjúku (HAPE), vatn í lungunum, sum stendst av súrevnistroti. Men hóast vandan og ógvusliga pínu, helt Arne leiðina fram upp móti tindinum og klokkan 8.15 stóð hann so, sum fyrsti føroyingur nakrantíð, ovast á heimsins hægsta tindi.

Men Arne var í lívsvanda orsakað av vætuni í lungunum. Hann mátti niður aftur sum skjótast:
*"Komin væl niður aftur og í tryggleika, er lættari at viðurkenna og gleðast yvir bragdið"*, sigur Arne - og vit eru fegin um og stolt av at kunna hátíðarhalda 75-árið fyri "Merkinum" við hesari myndini.

Og tað er ikki uttan orsøk, at føroyski fjallaklintrarin hevði Merkið við sær til heimsins hægsta tind. Vit føroyingar eru yvirhøvur fegnir um okkara fremstu tjóðarímynd, sum er ein týðandi partur av okkara tjóðskaparkenslu. Kanska hevur tann heldur ókyrra søgan hjá flagginum eisini verið við til at prenta tað so virðiliga í kollektivu føroysku tilvitskuna. Tí hóast vit í ár hátíðarhalda 75 ára dagin hjá Merkinum sum alment tjóðmerki, er flaggið sjálvt eldri enn so.

**Merkið – Studentaflaggið**

Í tjóðskapartíðini, sum meir ella minni byrjaði við vælkenda Jólafundinum í 1888, gjørdist tørvur á einari savnandi tjóðarímynd. Til fólkafundir og líknandi samkomur





høvdu føroyingar brúkt ymisk fløgg, eitt nú sonevnda Tjaldursmerkið og Veðramerkið.

Í 1919 avgjørdu tríggir føroyskir studentar í Keypmannahavn, Jens Oliver Lisberg, Thomas Pauli Dahl og Janus Øssurson tó at tekna eitt flagg av sama sniði sum hini norðurlendsku krossmerkini. Fyrimynd fyri teirra uppskoti vóru fløggini hjá Noregi og Íslandi, sum teir mettu sum nærmastu brøðratjóðir føroyinga. Litirnir í hesum fløggunum vóru reytt, blátt og hvítt – og av tí at norska flaggið hevði reyðan dúk, meðan íslendska hevði bláan, mátti føroyska flaggið hava hvítan dúk fyri at bregða frá hinum. Sambært Paula Dahl, var tað Jens Oliver Lisberg, ið avgjørdi at krossurin skuldi vera reyður við bláum borda.

Til eina veitslu í Føroyingafelagnum í Keypmannahavn, tann 2. mars 1919, fingu studentarnir ungu gentuna Ninnu Jacobsen at seyma eitt borðflagg. Hetta flaggið tóku teir til Nordisk Fane- og Flagfabrik í Keypmannahavn og fingu framleitt eitt borðflagg í part. Flaggið fekk góða undirtøku á veitsluni og seinni fór Lisberg út aftur á flaggverksmiðjuna og fekk tey at gera eitt í fullari stødd. Hann tók flaggið við sær inn á studentaheimið Regensen (Í Garði), har ein fjórði lesandi føroyingur,ið verður nevndur í samband við flaggið, Emil Joensen, búði. Teir hongdu flaggið út av kamarsglugganum hjá Joensen, fagnaðir av íslendskum studentum, ið eisini búðu á studentaheiminum. Regensen gjørdist sostatt staðið, har føroyska flaggið veittraði á fyrsta sinni.

Á sumri 1919 fór Jens Olivur Lisberg heim til Føroya í summarfrí. Við sær hevði hann "Studentaflaggið", sum tað róptist tá. Eftir hvat sigst, hevði hann ætlanir um at royna at fáa løgtingið til at góðkenna tað sum tjóðarflagg, men tað varð, av ókendum orsøkum, ikki til nakað. Men heima í heimbygdini Fámjin, varð flaggið vundið á stong hetta summarið – fyri fyrstu ferð á føroyskari jørð. Tá Lisberg fór niður aftur, lá flaggið eftir



heima – og hetta, tað fyrsta føroyska flaggið hongur nú í kirkjuni í Fámjin. Eitt ár seinni, tann 31. august 1920, doyði Jens Oliver Lisberg av Sponsku sjúku – og upplivdi sostatt ikki, hvussu flaggið so líðandi vann frama millum landsmenn hansara.

Upp gjøgnum tjúguárini byrjaðu føroyingar at taka studentaflaggið til sín. Tað fekk navnið "Merkið" og var serliga væl umtókt millum sjómenn. Skip og bátar byrjaðu at sigla undir Merkinum og eisini á landi vaks tokkin til flaggið. Hetta førdi, sum vera man, ávíst stríð við sær. Fólk vildu hava Merkið góðkent sum tjóðarflagg, meðan danskir myndugleikar stríddust ímóti. Í 1938 ráddi amtmaðurin Hilbert donsku stjórnini at viðurkenna Merkið, men uttan úrslit.

Endaliga viðurkenningin kom ikki fyrr enn í apríl 1940, tá sambandið millum Danmark og Føroyar varð kvett orsaka av týsku hersetingini av Danmark. Nakrar dagar seinni vórðu Føroyar formelt hersettar av Stórabretlandi. Tað vísti seg at vera ein trupulleiki, at føroysk skip førdu Dannebrog og høvdu "DANMARK" málað á skipssíðurnar. Bretska herflotastjórnarráðið kravdi, at føroysk skip skuldu strika Dannebrog og antin sigla undir Merkinum ella Union Jack, fyri at sleppa í bretska havn.

Komandi dagarnar ráddi úrstandur og stríð um málið heima í Føroyum. Føroyingar vildu sigla undir Merkinum, meðan Hilbert amtmaður mótmælti. Málið varð avgjørt tann 25. apríl, tá bretski konsulin Mason avgjørdi at føroysk fiski- og farmaskip framyvir skuldu føra Merkið og hava FAROES – FØROYAR málað á síðurnar.

Sum kríggið leið, gjørdist føroyska flaggið aðalmerkið hjá føroyska flotanum. Í 1947 varð 25. apríl útnevndur sum føroyskur flaggdagur – og tá heimastýrið tók við í 1948, varð Merkið endaliga góðtikið sum tjóðarflagg Føroya.

*Anker Eli Petersen*

# Fyrstadagsbjálvar - apríl 2015

Fyrstadagsbjálvar fáast bæði frímerkjasettum og einkultmerkjum, har eitt frímerki er sett á hvønn bjálva og við fýra eins frímerkjum á hvørjum bjálva.

Niðanfyri eru myndir av fyrstadagsbjálvunum frá útgávunum 'Europa 2015" og "Merkið - 75 ár"


















# Onnur ferð mín til Føroya!

Tá eg fór úr Føroyum fyri tveimum árum síðan, lovaði eg mær sjálvum at tað ikki skuldi ganga ov long tíð til eg aftur vitjaði hesar vøkru oyggjar. Hetta lyftið helt eg, tá eg og kona mín sum nýgift vitjaðu oyggjarnar tíðliga á vári 2014.

Ein týdningarmikil partur av okkara brúdleypsferð var at leiga ein bil og koyra til Klaksvíkar, Gásadals og Gjáar. Vit fóru við ferjuni út í Kallsoynna og gingu allan vegin heilt út til vitan á Kallinum. Tað var ein heilt einastandandi frískligur gongutúrur í nógvum vindi. Á túrinum máttu vit bæði finna út av hvussu vit skuldu halda seyðunum burtur og samstundis verða blíð við teir.

Sum ein rættur frímerkjasavnari, so havi eg sent hundraðtals postkort frá høvuðsposthúsinum hjá Posta í Havn. Hesa ferð bar til at vitja enn fleiri føroyskar bygdir - vit kundu steðga á og heilsa upp á allar teir einsamøllu bláu postkassarnar, sum lýstu upp í landslagnum í kalda og frískliga veðrinum. Sum kona mín segði: "hetta var eisini ein ferð at leita eftir postkassum fram við veðurbardu strondini úr einari bygd í aðra."

Eg fekk somuleiðis møguleika at hitta gomlu vinir mínar á skrivstovuni hjá Frímerkjadeildini hjá Posta seinastu tveir dagarnar á ferðini. Aftur hesa ferð møttu vit stórum gestablídni. Mær dámdi sera væl at vera á skrivstovuni og skifta orð um seinasta rákið innan frímerkjasavning og um tey ymsu ynskini, sum ein frímerkjasavnari kann hava. Tíverri eydnaðist heldur ikki hesa ferð at vitja Nólsoy og Mykines, men sum orðatakið sigur: "tað er altíð eina aðru ferð". Nógvur kavi beyð okkum vælkomin, tá vit komu og somuleiðis eisini, tá vit fóru avstað aftur. Bíða bara - hann fer at biðja okkum um at koma aftur eina triðju ferð.

*Wang Jiayi – Mike*
*Shanghai, Kina*



# Nýggjar frímerkjaútgávur - 11. mars og 24. apríl 2015



Royndarprent

* hesi frímerki eru eisini givin út í tveimum heftum við fýra frímerkjum hvør


Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Sólarmyrking** |
| Útgávudagur: | 11.03.2015 |
| Virði: | 17,00 og 19,00 kr. |
| Nummur: | FO 808-809 |
| Frímerkjastødd: | 24,9 x 42 mm |
| Stødd, ark: | 135 x 65 mm |
| Lagt til rættis: | Martin Mörck |
| Prenthættur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | bpost, Belgia |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa og onnur lond, 0-50 gr. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Europa 2015: Gamlar leikur** |
| Útgávudagur: | 24.04.2015 |
| Virði: | 17,00 og 22,00 kr. |
| Nummur: | FO 810-811 |
| Frímerkjastødd: | 30 x 34 mm |
| Design: | Edward Fuglø |
| Prenthættur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Europa, 0-50 g og 51-100 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Merkið 75 ár** |
| Útgávudagur: | 24.04.2015 |
| Virði: | 11,00 og 12,00 kr. |
| Nummur: | FO 812-813 |
| Frímerkjastødd: | 30 x 40 mm |
| Myndir: | A. Vatnhamar / Andrea Ricordi |
| Prenthættur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Miðal- og stórbrøv í Føroyum, 0-50 g |


Framsíðumynd: Full Sólarmyrking
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: Føroyaprent



Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo


Find us on Facebook